RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing 2024

**Innihaldsyvirlit**

# Innihald


1. Inngangur ........ 3

2. Árið....... ........ 4

2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð ........ 4

2.2 Innlendis søla av rúsdrekka ........ 4

2.3 Tollfrí søla ........ 5

2.4 Avlopskrav til avgjald ........ 5

2.5 Sølubúðir og tænasta ........ 5

2.6 Lønir og starvsfólkakostnaður ........ 6

2.7 Árið samanumtikið ........ 6

3. Búskapur ........ 7

3.1 Umsetningur ........ 7

3.2 Sølugongdin gjøgnum árið ........ 7

3.3 Rakstraravlopskravið ........ 8

4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl ........ 9

4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ........ 9

4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar ........ 10

4.3 Vøruúrval býtt í vørubólkar ........ 12

5. Ársroknskapur fyri 2024 ........ 13

5.1 Rakstrarroknskapur ........ 13

5.2 Fíggjarstøða ........ 14

5.3 Notur ........ 15

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 111 frá 20. oktober 2023 við ásetingum í kunngerð nr. 112 frá 25. oktober 2023.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur átta handlar kring landið. Teir liggja í: Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, Sandi, Trongisvági, Vestmanna og við Norðskála. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur.

Harumframt er goymsla á Hjalla og fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur 36 fólk í føstum starvi. Harafturat eru umleið 30 fólk í tímaløntum starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2024. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2024.

Tórshavn, tann 8. juli 2025

Oddbjørg Højgaard

stjóri

# 2. Árið

## 2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð

Síðan einkarsølan Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) varð sett á stovn, er ein miðvís broyting í drekkimynstrinum í Føroyum farin fram. Frá í mestan mun at drekka spiritus er drekkimynstrið støðugt broytt til, at tað fyri tað fyrsta verður drukkið minni pr. íbúgva 15 ár og eldri. Ístaðin verður keypt minni av spiritusi og meira vín og øl, sum hevur lægri alkoholstyrki. Hetta er at fegnast um, tí tað var júst hetta, sum upprunaliga var málsetningurin við rúsdrekkalógini og einkarsøluni.

Staðfestast kann, at einkarsølan hevur virkað væl sum alkoholpolitiskt stýringsamboð hjá landinum.

Broytingin í drekkimynstrinum hevur tó við sær minni inntøku hjá RSL – Og er hetta orsakað av avgjalds og príspolitikkinum. RSL hevur tó áhaldandi arbeitt við at tillaga raksturin til hesar broytingarnar í alkoholnýtsluni. Rakstrarkostnaðurin er eisini øktur grundað á lønarhækkingar og aðrar príshækkingar í samfelagnum.

## 2.2 Innlendis søla av rúsdrekka

Seinasta uppgerðin vísir, at sølan av rúsdrekka er støðug og fylgir í stóran mun fólkatalinum. Handlarnir hjá Rúsdrekkasøluni selja áleið tað sama ár um ár. Føroyingar hava tó flutt seg til at keypa meira veikan løg enn teir gjørdu fyrr. Serliga sølan av spiritusi er minkað.

Av øllum vørusløgum, vórðu seldir 188. t. litrar innanlands av reinum alkoholi í 2024. Hetta er 4 t. litrar minni enn undanfarna ár. Í 2023 vórðu seldir tilsamans 192 t. litrar innanlands av reinum alkoholi.

Tølini vísa, at meira verður selt av víni, meðan minni verður selt av spiritusi. Í 2015 vórðu seldir 50.736 litrar innanlands av reinum alkoholi av víni. Í 2024 var talið 55.901 litrar av reinum alkoholi.

Sølan av ølið er broytt frá 56.415 litrum av reinum alkoholi í 2015 til 61.707 litrar av reinum alkoholi í 2024. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 9,4%.

Í 2015 vórðu seldir 68.497 litrar innanlands av reinum alkoholi av spiritusi og í 2024 var talið 65.830 litrar. Hetta svarar til eina minking á 3,9%, samstundis sum fólkatalið í Føroyum í sama tíðarskeiði er vaksið við áleið 5.562 fólkum svarandi til 11,3%.

Endamálið við Rúsdrekkasøluni var m.a., at hon skuldi virka fyri at tálma nýtsluni. Nýtslan í

1992 var 8,8 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Í 2024 var hon 6,1 litrar.

Í hesum tølum sæst, at rúsdrekkavanarnir eru nógv broyttir síðan Rúsdrekkasølan varð sett á stovn. Nógv meira veikt, enn sterkt, verður keypt, og fleiri njóta, heldur enn bara at rúsa seg.

### 2.3 Tollfrí søla

Tollfría sølan er minkað nakað tey seinastu 10 árini. Sølan av tollfríum reinum alkoholi er minkað við 4.124 alkohollitrum úr 34.929 alkoholitrar í 2015 til 30.805 alkohollitrar í 2024. Hetta svarar til eina minking uppá 11,8%. Til samanberingar er innlendissølan uttan tað tollfría vaksin við 4,6% í hesum skeiðnum.

Tollfría sølan av reinum alkoholi í spiritusi, minkaði úr 25.226 litrum í 2015 niður í 19.626 litrar í 2024. Sølan av reinum alkoholi í víni, vaks úr 8.253 litrum av reinum alkoholi í 2015 upp í 10.166 litrar av reinum alkoholi í 2024.

### 2.4 Avlopskrav til avgjald

Stovninum er í 2024 álagt at veita landinum 18,600 mió. kr. í avlopi. Hetta er tað sama sum í 2023. Endaliga avlopi fyri 2024 er 18,9 mio. kr.

Avlopskravið er fastsett hvørt ár, sama um nýtslan veksur ella minkar. Eitt avlopskrav hevur verið álagt stovninum, síðan hann fór at virka í 1992. Málið við hesum var, at avlopið lutvíst skuldi nýtast at fíggja upplýsandi virksemi um skaðarnar av rúsdrekka og til at viðgera rúsdrekkamisnýtslu.

### 2.5 Sølubúðir og tænasta

Arbeitt hevur eisini verið við at menna landsfyritøkuna – Ynski er, at hon verður á jøvnum føti við fremstu rúsdrekkasølur í norðurlondum og tí er umráðandi, at dentur áhaldandi verður lagdur á at uppfylla tann eftirspurningin, sum viðskiftafólk okkara eftirspyrja og ynskja. Arbeitt verður tí javnt og miðvíst við at laga seg til hesar broytingarnar.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur 8 sølustøð kring landið. Rúsdrekkasølan hevur leingi havt ynski um at uppstiga tænastustøðið og virksemi sítt í høvuðsstanum: Tórshavn/Hoyvík, so vit kunnu veita eina betur tænastu til økta fólkatalið í økinum.

### 2.6 Lønir og starvsfólkakostnaður

Lønir og starvsfólkaksotnaður hækkaði í tíðarskeiðnum 2015-2024 til index 138. Lønir og starvsfólkakostnaðir umboðar størsta part av rakstrarkostnaðinum í rakstrarroknskapinum, og svaraði teir í 2024 til 12,2% av umsetninginum.

### 2.7 Árið samanumtikið

Samanumtikið metir leiðslan, at árið er nøktandi, men neyðugt er áhaldandi at tillaga raksturin fyri at ganga øktu útreiðslunum á møti. Eisini er broytta keypsmynstrið við lægri inntøku sum fylgju ein áhaldandi avbjóðing, tá hugsað verður um avlopskravið.

# 3. Búskapur

## 3.1 Umsetningur

Seinastu árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni ligið millum uml. 146 og 160 mió. kr.

Umsetningurin í 2021 er hin største, síðan Rúsdrekkasølan varð sett á stovn. Á talvuni niðanfyri sæst umsetnignurin fyri árini 2020 til 2024.

Umsetningurin í t.kr. fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|
| 145.745 | 159.792 | 156.556 | 151.668 | 148.867 |

*Talva 3.1: Árligi umsetningurin í t.kr., 2020-2024*

## 3.2 Sølugongdin gjøgnum árið

Mánaðarliga sølan er rættiliga skiftandi gjøgnum árið. Gongdin í mánaðarligu søluni í 2023 býtir seg áleið eins og árið fyri. Minsta sølan er vanliga í byrjanini av árinum, meðan summarsølan og sølan fram ímóti ársskiftinum vanliga er størri.




| | Januar | Februar | Mars | Apríl | Mai | Juni | Juli | August | September | Oktober | November | Desember |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2020 | 8.468 | 9.840 | 9.775 | 9.564 | 12.479 | 12.964 | 17.967 | 9.860 | 10.481 | 11.898 | 12.363 | 20.086 |
| 2021 | 8.535 | 11.331 | 14.240 | 11.024 | 13.389 | 13.416 | 19.080 | 11.823 | 11.967 | 12.342 | 11.928 | 20.717 |
| 2022 | 7.653 | 10.323 | 11.336 | 13.443 | 14.159 | 14.293 | 17.605 | 12.493 | 11.147 | 12.050 | 12.229 | 19.825 |
| 2023 | 8.141 | 9.856 | 11.299 | 11.525 | 13.639 | 15.025 | 16.492 | 11.993 | 10.893 | 10.885 | 12.363 | 19.556 |
| 2024 | 8.061 | 10.158 | 11.916 | 10.711 | 13.786 | 12.264 | 17.645 | 11.413 | 9.864 | 11.341 | 12.522 | 19.186 |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2020-2024*

### 3.3 Rakstraravlopskravið

Kravið til avlop av rakstrinum varð í 2010 hækkað við 42% úr 11,8 mió. kr. til 16,8 mió. kr. Avlopskravið varð í 2018 lækkað við 800 t.kr. ið vórðu latnar sum avsláttur til loyvishavarar og sostatt ikki høvdu nakað fíggjarligt árin á Rúsdrekkasøluna.

Rakstraravlopskravið varð í 2022 økt við 16% ella 2,6 mió. kr. frá 16,0 mió. kr. til 18,6 mió. kr. Í 2024 var avlopskravið eisini 18,6 mió. kr.

Rúsdrekkasølan hevur í 2022, 2023 og 2024 haft afturgongd í umsetninginum í mun til undanfarin ár. Tað er ringt at siga, hví so er. Tað kann verða, at meira verður keypt tollfrítt, meira kann verða keypt frá bryggjaríum ella at fólk raðfesta øðrvísi nú enn áður.

Í 2022 minkaði umsetningurin við 3,2 mió. kr. í mun til 2021. Í 2023 minkaði umsetningurin 4,9 mió. kr. Í mun til undanfarna ár. Í 2024 minkaði umsetningurin 2,8 mió. kr. Hóast hetta eydnaðist tað at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2024.

Kravið var kr. 18.600.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til høli, starvsfólk og umsiting. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið kr. 18.922.811 tvs. ein munur uppá kr. 322.811.

# 4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl

Hesin parturin viðgerð hagtøl og vísutøl fyri søluna í 2020-2024 Eisini verða viðmerkingar gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir




| | Tórshavn | Klaksvík | Drelnes | Miðvágur | Sandur | Saltangará | Noðrskála | Vestmanna | Ordrar o.a. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2020 | 62.219 | 15.036 | 10.616 | 7.906 | 3.374 | 14.556 | 8.861 | 2.340 | 20.838 |
| 2021 | 64.320 | 15.736 | 11.581 | 8.269 | 3.462 | 15.370 | 7.725 | 2.349 | 30.981 |
| 2022 | 58.478 | 15.258 | 10.849 | 7.927 | 3.311 | 14.894 | 7.373 | 2.183 | 36.283 |
| 2023 | 56.619 | 14.704 | 10.250 | 7.503 | 3.315 | 14.773 | 7.208 | 2.149 | 35.147 |
| 2024 | 56.152 | 14.394 | 10.239 | 7.609 | 2.778 | 14.503 | 7.134 | 2.066 | 33.990 |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2020-2024*

Talvu 4.1 omanfyri vísir, at umsetningurin hevur verið rættiliga javnur gjøgnum árini. Útvið helmingurin av umsetninginum í sølubúðum stavar frá deildini í Tórshavn. Felstu deildirnar hava selt nærum tað sama sum undanfarna ár, tó við lítlari afturgongd fleiri staðni.




| | Tórshavn | Klaksvík | Trongisvágur | Miðvágur | Sandur | Saltangará | Norðskála | Vestmanna | Ordrar o.a. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2020 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 2021 | 103 | 105 | 109 | 105 | 103 | 106 | 87 | 100 | 149 |
| 2022 | 94 | 101 | 102 | 100 | 98 | 102 | 83 | 93 | 174 |
| 2023 | 91 | 98 | 97 | 95 | 98 | 101 | 81 | 92 | 169 |
| 2024 | 90 | 96 | 96 | 96 | 82 | 100 | 81 | 88 | 162 |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2020-2024*

Í talvu 4.2 eru vísitølini sett til 100 í 2020 og í 2024 er samlaða vísitalið 102 fyri allar handlar.

Tað er stórur vøkstur í bíleggingum, tó at bíleggingarnar eru minkaðir nakað í mun til 2023. Flestu deildirnar kring landið eru í minking, í mun til undanfarna ár og í mun til 2020. Undantakið er deildin í Saltnagará. Hon stendur í stað.

## 4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum og býtt í vørubólkar. Eisini er sølan deild upp í innanlands sølu og tollfría sølu. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Síðani kemur vørubólkurin vín/cider og spiritus. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

| Litrar/ár | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Spritus** | **320.290** | **331.083** | **344.408** | **313.854** | **270.433** |
| Innanlands søla | 266.311 | 276.179 | 285.694 | 266.799 | 233.309 |
| Tollfrí søla | 53.978 | 54.904 | 58.714 | 47.055 | 37.125 |
| **Vín/cider** | **616.866** | **635.289** | **650.427** | **673.102** | **651.480** |
| Innanlands søla | 536.163 | 549.491 | 568.506 | 617.909 | 607.191 |
| Tollfrí søla | 80.703 | 85.798 | 81.921 | 55.193 | 44.289 |
| **Heitvín** | **8.465** | **8.825** | **9.088** | **9.532** | **8.692** |
| Innanlands søla | 6.564 | 6.588 | 6.974 | 7.813 | 7.240 |
| Tollfrí søla | 1.901 | 2.237 | 2.114 | 1.719 | 1.452 |
| **Øl** | **1.129.153** | **1.148.223** | **1.213.108** | **1.281.314** | **1.249.200** |
| Innanlands søla | 1.116.060 | 1.132.469 | 1.196.032 | 1.261.362 | 1.229.918 |
| Tollfrí søla | 13.093 | 15.753 | 17.075 | 19.952 | 19.282 |
| **Alkoholfrítt** | **5.778** | **5.708** | **6.055** | **6.568** | **5.937** |
| Innanlands søla | 5.777 | 5.639 | 6.055 | 6.568 | 5.897 |
| Tollfrí søla | 1 | 69 | 0 | 0 | 40 |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2020-2024*

| Vísital/ár | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Spritus** | **118** | **122** | **127** | **116** | **100** |
| Innanlands søla | 114 | 118 | 122 | 114 | 100 |
| Tollfrí søla | 145 | 148 | 158 | 127 | 100 |
| **Vín/cider** | **95** | **98** | **100** | **103** | **100** |
| Innanlands søla | 88 | 90 | 94 | 102 | 100 |
| Tollfrí søla | 182 | 194 | 185 | 125 | 100 |
| **Heitvín** | **97** | **102** | **105** | **110** | **100** |
| Innanlands søla | 91 | 91 | 96 | 108 | 100 |
| Tollfrí søla | 131 | 154 | 146 | 118 | 100 |
| **Øl** | **90** | **92** | **97** | **103** | **100** |
| Innanlands søla | 91 | 92 | 97 | 103 | 100 |
| Tollfrí søla | 68 | 82 | 89 | 103 | 100 |
| **Alkoholfrítt** | **97** | **96** | **102** | **111** | **100** |
| Innanlands søla | 98 | 96 | 103 | 111 | 100 |
| Tollfrí søla | 1 | 175 | 0 | 0 | 100 |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2020-2024*

Talva 4.4 vísir gongdina í litrum/vørubólkum, sum indekserað tøl. Størsta afturgongdin sæst í tíðarskeiðnum 2020-2024 í vørubólkunum øl og vín, meðan størsta framgongdin í sama tíðarskeiði sæst í vørubólkinum spiritus.

### 4.3 Vøruúrval býtt í vørubólkar

Talva 4.7 niðanfyri vísir vøruúrvalið býtt í vørubólkar fyri tíðarskeiðið 2020-2024. Skilt millum tal á vørum seldar innanlands og vørur seldar tollfrítt, umframt at samlaða vøruúrvalið er víst.

| Úrval/ár | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Spritus** | **1.211** | **1.429** | **1.320** | **1.265** | **1.228** |
| Innanlands søla | 710 | 955 | 863 | 803 | 785 |
| Tollfrí søla | 501 | 474 | 457 | 462 | 443 |
| **Vín/cider** | **1.756** | **1.917** | **1.979** | **1.961** | **1.974** |
| Innanlands søla | 1.468 | 1.665 | 1.734 | 1.703 | 1.708 |
| Tollfrí søla | 288 | 252 | 245 | 258 | 266 |
| **Heitvín** | **103** | **122** | **105** | **125** | **126** |
| Innanlands søla | 76 | 94 | 81 | 102 | 101 |
| Tollfrí søla | 27 | 28 | 24 | 23 | 25 |
| **Øl** | **733** | **890** | **844** | **747** | **641** |
| Innanlands søla | 680 | 831 | 799 | 701 | 608 |
| Tollfrí søla | 53 | 59 | 45 | 46 | 33 |
| **Alkoholfrítt** | **75** | **83** | **74** | **52** | **55** |
| Innanlands søla | 73 | 82 | 73 | 49 | 54 |
| Tollfrí søla | 2 | 1 | 1 | 3 | 1 |
| **Íalt** | **3.878** | **4.441** | **4.322** | **4.150** | **4.024** |
| Innanlands søla | 3.007 | 3.627 | 3.550 | 3.358 | 3.256 |
| Tollfrí søla | 871 | 814 | 772 | 792 | 768 |

*Talva 4.7: Vøruúrval býtt í vørubólkar, 2020-2024*

Nógv størsta vøruúrvalið er í vørubólkinum vín/cider. Síðani koma vørubólkarnir spiritus og øl. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur. Samanumtikið seldi Rúsdrekkasølan 4.024 ymisk sløg av løgi í 2024 í mun til 4.150 sløg av løgi í 2023.

Vøruúrval og tænasta verða áhaldandi ment í mun til tað, ið rørir seg uttanlands umframt í trá við tað,+++ viðskiftafólk í Føroyum eftirspyrja. Hetta krevur nakað av starvsfólkum okkara, sum fegin arbeiða áhaldandi við at menna vøruúrvalið og kundatænastuna til frama fyri føroyingin og viðskiftafólk okkara sum heild.

# 5. Ársroknskapur fyri 2024

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2024 settur upp í mun til árið 2023. Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur.

## 5.1 Rakstrarroknskapur

| | Nota | **Ár 2024** | **Ár 2023** |
|---|---|---|---|
| Inntøkur: | | | |
| Vørusøla | | 148.866.993 | 151.667.673 |
| Vørunýtsla | | -104.255.606 | -107.225.047 |
| Skiftisavlop | | 44.611.387 | 44.442.626 |
| | | | |
| Útreiðslur: | | | |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -18.095.786 | -17.982.058 |
| Annar kostnaður | 2 | -7.463.907 | -7.148.245 |
| Útreiðslur tils.: | | -25.559.693 | -25.130.303 |
| | | | |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | | 19.051.694 | 19.312.324 |
| | | | |
| Fíggjarpostar | 3 | -34.934 | 28.079 |
| | | | |
| Roknskaparligt avlop | | 19.016.760 | 19.340.402 |

| ***Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini*** | | |
|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | 19.016.760 | 19.340.402 |
| Avskrivingar | | |
| Íløgur | -93.948 | -69.218 |
| Nettoavlop | 18.922.811 | 19.271.185 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | 18.600.000 | 18.600.000 |
| Munur | 322.811 | 671.185 |

## 5.2 Fíggjarstøða

| | Nota | 31.12.2024 | 31.12.2023 |
|---|---|---|---|
| **OGN:** | | | |
| Støðisogn | 4 | 1.930.061 | 1.836.113 |
| Vørugoymsla | | 13.529.241 | 13.365.769 |
| Vøru- og tænastuáogn | | 1.198.465 | 609.076 |
| Onnur áogn | | - | - |
| Tíðaravmarkingar | | 996.343 | 2.405.095 |
| Tøkur peningur | | 21.875.042 | 6.223.374 |
| OGN, tilsamans | | 39.529.151 | 24.439.427 |
| | | | |
| **SKULD:** | | | |
| Eginogn | 5 | 1.930.061 | 1.836.113 |
| | | | |
| Vøru- og tænastuskuld | 6 | 12.099.999 | 1.747.594 |
| Onnur skuld | | - | - |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 7 | 20.056.109 | 13.674.715 |
| Tíðaravmarkingar | | 3.636.545 | 5.767.264 |
| Meirviriðisgjald | | 1.806.436 | 1.413.740 |
| | | 37.599.090 | 22.603.314 |
| Eginogn og skuld tilsamans | | 39.529.151 | 24.439.427 |
| | | | |
| Leiguskyldur pr. 31.12. | | 7.669.720 | 8.645.400 |

## 5.3 Notur

| NOTUR 1-3: | Ár 2024 | Ár 2023 |
|---|---|---|
| **Nota 1, Starvsfólkakostnaður:** | | |
| Lønir | -14.757.034 | -14.546.086 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | -706.876 | -724.822 |
| Eftirlønir | -1.994.672 | -1.974.580 |
| Burðarfarloyvi | - | 45.733 |
| Annar starvsfólkakostnaður | -652.422 | -856.988 |
| Endurgoldið løn | 15.218 | 74.685 |
| Verkfallsløn | - | - |
| **Starvsfólkakostnaður tilsamans** | **-18.095.786** | **-17.982.058** |
| | | |
| **Nota 2, Annar rakstrarkostnaður:** | | |
| Høliskostnaðir | -4.723.368 | -4.285.907 |
| Fyrisitingar kostnaðir | -2.456.016 | -2.396.787 |
| Logistikkkostnaðir | -234.787 | -263.581 |
| Sølukostnaðir | -112.769 | -130.087 |
| Flutningsútbúðanur | -101.340 | -119.993 |
| Útr. viðv. undanfarin ár | 164.374 | 48.109 |
| Óvanligar útreiðslur | - | - |
| **Annar kostnaður tilsamans** | **-7.463.907** | **-7.148.245** |
| | | |
| **Nota 3, Fíggjarpostar:** | | |
| Rentuinntøkur | - | - |
| Rentuútreiðslur | - | - |
| Gjaldoyra vinningur/tap | -34.934 | 28.079 |
| **Fíggjarpostar tilsamans** | **-34.934** | **28.079** |

| NOTUR 4-7: | Ár 2024 | Ár 2023 |
|---|---|---|
| **Nota 4, Avskrivingar/støðisogn:** | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 49.938.748 | 49.869.530 |
| Regulering til undanfarin ár | | |
| Tilgongd | 93.948 | 69.218 |
| Útveganarvirði við ársenda | 50.032.696 | 49.938.748 |
| *Avskrivingar:* | | |
| - við ársbyrjan | -48.102.635 | -48.102.635 |
| - í árinum | | |
| Avskrivingar við ársenda | -48.102.635 | -48.102.635 |
| **Bókað virði við ársenda** | **1.930.061** | **1.836.113** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 5, Eginogn:** | | |
| Saldo við ársbyrjan | 1.836.113 | 1.766.896 |
| Regulering til primo | | |
| Roknskaparligt avlop | 19.016.760 | 19.340.402 |
| Nettoavlop, at avroknað | -18.922.811 | -19.271.185 |
| **Eginogn við ársenda** | **1.930.061** | **1.836.113** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 6, Vøru- og tænastuskuld:** | | |
| Vøruskuld | 5.763.321 | 889.227 |
| Tænastuskuld | 1.093.769 | 723.598 |
| Tollkredittur | 5.242.909 | 134.770 |
| **Vøru- og tænastuskuld tilsamans** | **12.099.999** | **1.747.594** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 7, Millumrokning við Gjaldstovuna:** | | |
| Saldo við ársbyrjan | 13.674.715 | 17.204.736 |
| Nettoavlop, at avrokna | 18.922.811 | 19.271.185 |
| Løngjaldstovan | 17.458.582 | 17.198.794 |
| Rentuinntøka peningastovnar | - | - |
| Goldið í árinum | -30.000.000 | -40.000.000 |
| **Millumrokning við ársenda** | **20.056.109** | **13.674.715** |